## Íslenskur fiskur reinur

Fiskur, sum er veiddur undir Íslandi, hevur munandi minni av ymsum dálkingarevnum í sær enn fiskur, sum er veiddur aðrastaðni í Evropa. Tað er niðurstøðan í einari frágreiðing um dálkingarevni í íslendskum fiski, og sum byggir á kanningar, sum vórðu gjørdar í árunum frá 2003 til 2006. Millum annað vístu kanningarnar, at tað var lítið blýggj, kyksilvur og kadmium í ísloendskum fiski, og at mongdin var langt niðan fyri hámarkskravið hjá ES-londunum, skrivar Vísir.



*Tað er lítið av skaðiligum evnum í íslendskum fiski*

*(Mynd: Vísir)*

## Trolarar umvældir

Høgaberg og Fagraberg, sum partrola eftir pelagiskum fiski, hava verið til umvælingar í summar, men nú líður arbeiðinum so væl, at skipini ætlandi fara aftur til fiskiskap um mánaðarskiftið. Høgaberg stendur á bedingini á Tórshavnar Skipasmiðju, meðan Fagraberg hevur ligið við bryggjuna í Fuglafirði. Tá umvælingarnar og ábøturnar eru lidnar, fara skipini væntandi at leita eftir sild. Tað fara hini uppisjóvarskipini ætlandi eisini.

# Nýtt turkivirki í Vági

**Saman við íslendingum hava tvey feløg í Suðuroy stovnað virki, sum skal turka fiskahøvd og -ryggir**

FISKAÍDNAÐUR
*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*



*Vágbingar fara nú at turka fiskahøvd og -ryggir*

Í næstum fara millum 15 og 20 fólk at arbeiða á einum virki, sum fer at turka fiskahøvd og -ryggir í Vági.

Íslendska felagið Arak hevur saman við Delta Seafood á Tvøroyri og HES Byg í Vági stovnað smápartafelagið Faroe Apama. Bæði stjórin og nevndarformaðurin eru íslendingar.

Tom Silvurdal í Vági, sum saman við Hans Egil Olsen umboðar tann føroyska partin í nevndini, sigur, at tað nýggja virkið fer ikki at líkjast tí í Leirvík. Eitt nú verður turkiskipanin afturlatin. Tom Silvurdal sigur, at talan er um rættiliga dýra útgerð, men at hon er neyðug fyri at lúka umhvørvistreytirnar.

Nýggja virkið fer at halda til í leigaðum hølum í Vági, og væntandi fara millum 15 og 20 fólk at arbeiða har.

## Frá gerandisklæðum til føroyskan búna



*Framsýningin leggur serliga dent á tann føroyska kvinnubúnan*

*(Mynd: Føroya Fornminnissavn)*

**Upp undir Ólavsøku letur upp nýggj framsýning um føroysk klæðir á Føroya Fornminnissavni. Framsýningin nevnist Frá gerandisklæðum til føroyskan búna**

Á framsýningini verður serligur dentur lagdur á føroyska kvinnubúnan. Nøkur mannfólkaklæðir og eldri gerandisklæðir eru eisini við. Endamálið við framsýningini er at lýsa, hvussu klæðir við sama sniði sum búnin hava verið nýtt í eldri døgum, men á øðrvísi hátt enn búnin í dag. Frá at vera gerandisklæðir eru klæðini í dag vorðin føroyskir búnar.

Elstu klæðini eru frá uml. 1850, men framsýningin varpar eisini ljós á nýtsluna av føroyskum búnum í dag. Millum annað verður kjóli hjá Eivør Pálsdóttir við, sum lýsir, hvussu hon nýtir búnan í listarligum høpi. Á heysti í fjør skipaði Føroya Fornminnssavn fyri myndatøku av kvinnum í egnum búna, sum høvdu latið seg í sum tær plaga. Myndirnar sýna búnar úr ymsum tilfari, við ymsum litum og mynstrum og lýsa sera væl tey fjølbroytni, sum sermerkja føroyskar búnar í dag.

Til børnini verða tekniørk av gentu og drongi í føroyskum búna at seta litir og gera mynstur á. Eisini vera gamlar dukkur í føroyskum búnum og gerandisklæðum sýndar fram.

Framsýningin Frá gerandisklæðum til føroyskan búna letur upp 26. juli kl. 10. Í sambandi við upplatingina bjóðar savnið kaffi, juice og smákøkur. Framsýningin er í framsýningarhølunum í Brekkutúni 6 í Hoyvík.



*Armgarð Absalonsen málar á spæliplássinum mundir Klakki*

*(Mynd: Dávur Wintherr)*

## Armgarð málar spæliplás

Spæliplássið á Jørundsgøtu í Klaksvík er nú prýtt við einari vakrari fótbóltsmynd, sum vísir yngri og eldri fótbóltsspælarar. Spæliplássið við Mylnugøtu er prýtt við myndum av plantum, fugli og fiski, og á spæliplássinum undir Klakki eru tað myndir úr griksku søguni, sum eru myndaevni. Tað er listakvinnan Armgarð Absalonsen, sum hevur málað. Armgarð gongur á listaskúla í USA, men hevur verið í heima og hildið summarfrí. Hon hevur verið við í fleiri listaframsýningum í Klaksvík.